Elin Danielsen
Útb. fysioterapeutur
Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77
ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG
HITA · MASSAGU · LINNA
Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan
stephanssons hús

Útsølu túrur
frá 3. - 5. september
Á ferðini verður m.a. skipað fyri Bingo
Skipaorkestrið spælir til dans
Og nógv góð tilboð í sølubúðum okkara
úr 650,-
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
www.smyril-line.fo

Laksatorg í Runavík

Leygardagin verður skipað fyri Laksatorgi í Runavík. Tað eru Runavíkar Kommuna og Eysturoyar Kunningarstova, sum skipað fyri tiltakinum.

Sum orðið eisini sigur, so verður laksurin eisini miðpunktið fyri komandi leygardag í Runavík. Íbúgvarnir í stóru kommununi í Eysturoynni fáa leygardagin høvi til at smakka eitt sindur av laksi. Á laksatorginum verður møguleiki at fáa ein ókeypis laksabita. Ein kokkur verður á staðnum, og hann fer at bjóða royktan, feskan ella graveraðan laks. Fyrireikararnir siga, at eitt stórt borð verður sett upp, har fólk so kunnu njóta ein betri bita við laksi. Høvi verður eisini at keypa okkurt drekkandi. Eisini fer kapróðrarfelagið at selja eitt sindur av laksi.

Rannvá Troest frá Eysturoyar Kunningarstovu siguur við Sosialin, at hetta er fyrstu ferð at skipað verður fyri einum tílíkum tiltaki, og endamálið er ikki annað uttan at geva íbúgvunum eitt spennandi og ókeypis tilboð.

Eisini vera nøkur tónleikatiltøk á skránni í sambandi við laksatorgið.

Jónsvein og Birgir við vinmonnum fara á uppsetta pallin kl. 12. Klokkan 13 verður ein sangbólkur úr Betesda at síggja á pallinum. »Eg eri ein K« og Absalon og dukkudreingirnir fara á pallin kl. 14, og ein dupultkvartett verður at hoyra kl. 15.

Langur leygardagur verður eisini í sambandi við laksatorgið.

Um kvøldið verður laksadansur, sum Støkk skipar fyri í Støkkhøllini.

-hr.

Runavíkingar fáa ókeypis laks leygardagin.

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.

Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Sosialurin

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra dóttir, kona, mamma og vermóðir

JENSINA ELISABETH SIMONSEN
ættað úr Sørvági og búsitandi í Havn

andaðist týsdagin 28.8.2001, 47 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr dómkirkjuni fríggjadagin 31.8.2001 kl. 13.00.

Famililjunnar vegna

Mo, Kim, Mariann, Beinta og Magnus

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, pápi, verfaðir, bróður, versonur og svágur

KÁRI JOHANNESEN
Fuglafjørður

flutti heim til Harran mánamorgunin 27.8.
52 ára gamal.

Jarðarferðin verður fríggjadagin 31.8.
kl. 14.00 úr Siloa.

Famililjunnar vegna

Liljan, Sólvá og Klæmint

Viggo og Maria

og Bergur

Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata Zarepta eina peningagávu. Konto í peningastovnunum.

Fr y st rst rv l v kk t lf r rk rt n,
yl u l st nn n ll v nnu k r
V t tv s n
l st kk r• kk n •T •M rkr•Et k tt r
Kn v r•K tl r•H vur•H n sk r•Sv ntur
Ym sk t lt l n n• n r s vn• n n r vn
l tt r• v n t l vn n v kk t lf r
...s lv n tl st r s n
FARPACK
DANAK
DNV
www.f r ckk.m

Original
bosal
Útstoyt
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629

Victor versus Dan:

Nýggja vitnið avdúkaði søguna um rokningina

Seinasti rættarfundurin hevur verið í málinum um ærumeiðing millum Victor Carlsen og Dan Klein. Nýggja vitnið avdúkaði, at arvingarnir høvdu fingið eitt bræv, sum tey mettu var ein rokning. Victor segði seg einki hava við hana at gera. Dómur verður sagdur fríggjadagin

RÆTTARMÁL
Stefan í Skorini

Drúgt stríð hevur tikið seg upp millum Victor Carlsen og Dan Klein um ærumeiðing. Dómur verður sagdur fríggjadagin

Endi fæst ikki á málinum um ærumeiðing millum Victor Carlsen og blaðstjórran á Oyggjatíðindum, Dan Klein, fyrr enn fríggjadagin á middegi, tá dómarin Henrik Møller fer at gera eina úrskurð í málinum.

Tað er Victor Carlsen, sum hevur stevnt Dan Klein fyri ærumeiðandi grein í Oyggjatíðindum 15. desember. Blaðið skýrir Victor pengagrís og vil vera við, at hann hevur sent rokning fyri 175.000 krónur til arvingarnar hjá manninum, ið móðir hansara var gift við. Hesar útsagnir vil hann hava dømdar deyðar at vera.

Nýggjar upplýsingar

Dan Klein hevði kallað eitt nýtt vitni í rættin. Hetta var Sofus Hansen av Skálafjørðinum, sum var sonur mannin, ið var giftur við móðir Victor. Nakað av fólki var komið oman í rættarhølini at lýða á, hvussu leikur fórst, og týðiligur spenningur var á teimum øllum.

Hann greiddi frá, at tey høvdu fingið eitt bræv, sum móðir Victor hevði skrivað undir, men Victor sjálvur hevði skrivað brævið. Í brævinum vórðu peningalig viðurskifti viðgjørd. Har varð roknað út, hvussu nógvan pening móðir Victor hevði latið húsarhaldinum hjá teimum báðum. Har vóru útreiðslur til bil og mánaðarliga útreiðslan til húsarhaldið løgd saman, og hetta gav eina upphædd uppá 455.161 krónur.

Tí metti móðirin, at hon hevði rætt til at fáa pening frá arvingunum hjá manninum. Tað var í hesum sambandi, at hon bað Victor Carlsen um at senda arvingunum hetta brævið, har skotið varð upp í endanum av brævinum, at tey lótu henni 500 krónur um mánaðin í tólv ár sum samsýning fyri at hava hildið hús hjá manninum. Hetta var kanska ein máti at fáa part av arvinum hjá manninum, sum børnini annars fingu.

Hetta mettu arvingarnir sum ein óbeinleiðis rokning, men teir kundu ikki siga, at tað var Victor sjálvur, ið vildi hava henda peningin. Hjúnini høvdu annars gjørt ein hjúnasáttmála, sum segði, at alt mítt er mítt, og títt er títt.

Victor ásannaði, at hann hevði skrivað hetta brævið fyri móðir sína, men hann tók samstundis frástøðu frá innihaldinum av brævinum og segði seg einki hava við tað at gera. Hann hevði bara hjálpt til at skriva tað.

Brævið er ikki rokning

Síðani skuldi tær seinastu viðmerkingarnar skuldi gerast, áðrenn Henrik Møller dómari fór at umhugsa støðuna. Bjørn á Heygum, sakførari hjá Victori Carlsen, vildi vera við, at hetta brævið ikki lýkur treytirnar at vera ein rokning, og tí var tað skeivt, sum stóð í Oyggjatíðindum, at Victor Carlsen skal hava staðið fyri eini rokning.

Hann vísti samstundis á, hvussu tyngjandi hesi útlalilsir í Oyggjatíðindum høvdu verið fyri Victor, og at tey tí áttu at verið dømd deyð at vera. Hann mælti dómaranum til at bótin skuldi vera 20 dagbøtur á 2.000 krónur. Hetta fór at hava við sær, at dómurin fór at virka fyribyrgjandi í framtíðini.

Hann vildi at enda vera við, at Dan Klein ikki hevði prógvað nøkur av sínum uppáhaldum í rættinum.

Fríir fjølmiðlar

Dan Klein var sjálvandi ósamdur við sakføraran. Hann vísti á, at Victor Carlsen var almennur persónur, og at hann tí átti at tola meira av enn onnur, og at hann var áhugaverdur hjá almenninginum.

Hann segði, at Victor hevði allar møguleikar at greiða frá ella at avsanna tíðindini, tá Dan Klein hevði samband við Victor, áðrenn greinin varð prentað í blaðnum.

Hann vildi eisini vera við, at orðið pengagrísur ikki er nakað ringt orð. Dan samanbar orðið við »grams«, sum ikki er mett at vera ærumeiðandi. Hann legði harafturat Victor Carlsen undir at fjala sannleikan í rættinum.

Hesin dómurin fór at avgera, um fjølmiðlarnir í framtíðini fóru at kunna virka frítt, ella um munnkurv fór at verða løgd á teir við eini harðari revsing í hesum málinum, segði Dan Klein.

Dómur verður sagdur fríggjadagin, og tá fæst at vita, um Dan Klein hevur ærumeitt Victor Carlsen ella um Dan Klein fær viðhald í greinini.

PostScriptPicture
(L\340sing\(outline\).eps)